## Stórt fall í Kina

Teir seinastu mánaðirnar er partabrævavirðið fallið sera nógv á kinesiska marknaðinum. Virðið setti met í oktobur í fjør, men síðani er tað fallið meiri enn 50 prosent, skrivar Reuters. Tó skal sigast, at frammanundan var virðið seksfaldað eftir bara tveimum árum. Ein orsøk til tað stóra fallið nú er, at kinesiska stjórnin hevur gjørt av at tálma inflasjónini, og íleggjarar vænta, at tiltøkini fara at skerja rakstraravlopið hjá virkjum og fyritøkum.



## Fór frá av skattasviki

Forstjórin í Samsung, Lee Kun-hee, kunngjørdi í suðurkoreanska sjónvarpinum, at hann fer úr stjórastarvinum. Tað hendir, eftir at forstjórin í síðstu viku varð skuldsettur fyri skattasvik og mandatsvik. Skuldsetingin er úrslit av drúgvari kanning, har skattavaldið hevur kannað viðurskiftini hjá Kun-hee, sum er millum ríkastu menn í Suðurkorea. Samsung er størsta fyritøkan í Suðurkorea, men skuldsetingin hevur ikki ávirkað fyritøkuna.

*Lee Kun-hee leggur frá sær eftir skuldseting um skattasvik (Mynd: Vísir)*

# Nógv fólk til fundartiltak í Øravík

**- Vit hava gjørt avtalu við nøkur av teimum, sum við vóru, um at koma til fundar við okkum, har vit fara at umrøða nøkur av hesum hugskotum nærri, Kitty Mai Elletsen**

ÍVERKSETAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eini 70 fólk vóru til íverksetarakvøld í Øravík í gjárkvøldið. Talan var bæði um vinnulívsfólk, umboð fyri kommunur og áhugaðar íverksetarar.

Fýra áhugaverdir fyrilestrar vórðu hildnir, og fólk sýndu tiltakinum stóran áhuga.

Í fyrsta lagi vóru tað Rani Nolsøe, stjóri í Íverksetanarhúsinum í Klaksvík og Kitty Mai Ellefsen, nevndarformaður, sum høvdu orðið.

Umboð fyri Taks greiddu eisini frá, hvussu almennu Føroyar møta íverksetarum, og hvørji krøv verða sett fyri at kunna seta á stovn eina lógliga fyritøku. Regin Dalsgaard, íverksetari, segði frá síni fyritøku, sum hevur ment eina skipan við sms-boðum, sum ikki minst fyritøkur kunnu brúka í sínum arbeiði at kalla fólk til arbeiðis.

Áðrenn fundurin í Øravík byrjaði, vóru umboðini fyri Íverksetarahúsið í Klaksvík og vitjaðu borgarstjóran á Tvøroyri.

Kitty Mai Ellefsen sigur, at hópur av góðum hugskotum komu fram á fundinum, og hon leggur dent á, at tað vóru fleiri, sum veruliga høvdu góð hugskot.

- Vit hava gjørt avtalu við nøkur av teimum, sum við vóru, um at koma til fundar við okkum, har vit fara at umrøða nøkur av hesum hugskotum nærri, sigur hon.

Íverksetanarhúsið hevur ferðast kring landið og hildið fundir, eins og skeiðvirksemi hevur verið í Klaksvík.

- Vit vóru soleiðis á Sandi týsdagin í síðstu viku, og eisini her var stórur áhugi fyri tiltakinum, sigur hon.

Kitty Mai vísir á, at Íverksetanarhúsið í Klaksvík sjálvandi spennir um alt landið, og hon fegnast um, at Klaksvíkar kommuna og Eik Banki hava stuðlað húsinum og verkseminum so væl.

- Tað liggur stórt potentiali í íverksetan, og hetta er eitt potentiali, sum vit onga løtu ivast í fer at síggjast aftur í búskapinum, sum tíðin gongur, sigur nevndarformaðurin fyri Íverksetanarhúsið.

Nú fíggjarlógin er løgd fram, fegnast Kitty Mai Ellefsen eisini um, at játtanin til Vinnuframagrunnin er økt við 1,4 miljónum krónum til íverksetan.

- Vit hava eisini søkt um játtan á fíggjarlógini, men hava ikki fingið nakað í hesum umfari. Tí fegnast vit um, at meira peningur kortini er játtaður til Vinnuframagrunnin við tí endamáli at skapa betri karmar fyri íverksetan, sigur hon.

at søkja – og far avstað við tær. Meðan eg fylti út umsóknarblaðið, kom jantiróddin aftur: Hvat er tað, tú gert? Søkir tú inn sum cand merc.? Tú dugir jú slett ikki matematikk. Tú fert at dumpa, og øll fara at finna út av, at tú dugir ikki til nakað.

Hon segði, at hendan dagin, hon sat við umsóknarblaðnum, megnaði hon at skumpa røddina burtur.

- Eg fylgdi mínum dreymi, og stívliga fimm ár seinni stóð eg við prógvinum í hondini.

Kitty Mai segði, at hon hevði fylt sínum dreymum síðan hendan dag, og at hon fylti dreyminum um útbúgving, hevur hann størst týdning í hennara lívi.

- Hetta gav mær eina inniliga trúgv upp á, at eg megni tað, eg seti mær fyri – og fái tað, sum eg fari eftir.

**Niðurgjørdir**

Íverksetarar siga ofta, at almenna fyrisitingin í Føroyum er stirvin. Reglurnar eru so nógvar, og tey á Taks eru óvinarliga og fara við fólki sum skurkum.

- Allir íverksetarar hava upplivað at byrja í tí smáa, og nógvir hava eisini upplivað at vera niðurgjørdir. Tú eigur eisini at prioritera, tá ið ræður um tey menniskju, tú umgangst. Summi fólk drena allan mergin úr tær. Eitt tað ringasta er slatur og sleyg, og hetta heldur nógvum fólki aftur í at royna síni hugskot og fylgja teimum.

Á fundinum í Øravík legði Kitty Mai dent á, at tú sum íverksetari ikki eigur at hugsa um, hvat onnur halda um teg.

- Tað er líkamikið, hvat onnur halda. Tað einasta, sum hevur týdning, er, hvat tú heldur um teg sjálvan - og tú skal trúgva, at tú gert tað besta. Tú eigur heldur ikki at tosa niðursetandi um onnur. Ert tú glaður, hevur tú tað eisini gott og eigur ikki at tosa ringt um onnur.

Kitty Mai Ellefsen segði í Øravík, at Íverksetanarhúsið í Klaksvík rættiliga hevur verið eitt frambrot fyri føroyskar íverksetarar.

At enda hevði hon hesi ráð til íverksetarar:

- Takið altíð kjansir við skili, og um tit ætla tykkum undir nýggja fyritøku, kannið so øll viðurskifti fyrst, segði hon.



*Vinnulívsfólk og borgarstjórar á íverksetanarfundi í Øravík. Stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren L. Bruun, fegnaðist um tiltakið*
*Mynd: Kitty Mai Ellefsen*





## Hús til sølu í Vestmanna

Hús úti á Rógvu í Vestmanna til sølu.
Sera gott útsýni um alla bygdina.

**Veghædd:** Kjallari, hjallur, urtagarður.
**Miðhædd:** Køkur, stova, kamar, trappugongd.
**Loft:** 3 kømur, baðirúm.

Nýtt tak fylgir við.

**Prísuppskot: 700.000,-**

**Áhugaði kunnu ringja 21 20 90 ella 42 43 03**